# Hesturin hevur sterkari bein

Ein strævin mánaður er nú nærum komin at enda hjá jólamonnunum kring landið. Úr Skeivhelli, Háfjalli, Slættaratindi, Skælingi og aðra staðni við eru hópin av jólamonnum komnir at vitja skikkilig børn kring alt landið.

Í flest øllum førum hava hesir góðu jólamenn eisini havt gávur við sær, og tað sigur seg sjálvt, at tað ikki bara er sum at siga tá, tá somikið nógvir pakkar í ymsari støðd og vekt skulu berast kring alt landið.

Tað var gamalt, at jólamenninir vóru til gongu, men hetta man mangan hava verið eitt øgiligt knoss hjá teimum. At hugsa sær, at skula ganga oman og niðan Skælingsfjall óteljandi ferðir, soleiðis at allir pakkarnir kunnu býtast runt. Ikki løgið, at teir sova størsta partin av januar mánaði, áðrenn teir spakuliga byrja at fyrireika komandi næstu jólini, tá vit eru komin nakað inn í februar.



*Tá ferðast verður á hestbaki, er slitið á gomlu knøini væl minni. Somikið væl minni, at jólamaðurin heldur seg kunna starvast í minst 100 ár afturat*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tað eru tó ikki allir jólamenn, sum eru eins konservativir. Hesum fitta jólamanninum hitti myndamaður okkara mikudagin. Snøgt sagt, so helt hann seg hava runnið nóg ofta niðan á fjalli, og tá giktin eisini var farin at gera um seg, so ræður jú at finna aðrar vegir, so slitnu knøini kunnu sparast nakað.

Eftir gjølliga umhugsan, kom jólamaðurin til ta niðurstøðu, at tað mundi ikki bila nakað, um ferðin varð gjørd á hestbaki, heldur enn til gongu. Væl vitandi, at ikki allir starvsfelagar hansara vóru eins fegnir um hetta, so lænti hann eina ryssu frá bóndanum, sum býr har nærhendis. Ryssan hevur jú góð og sterk bein - ikki færri enn fýra av slagnum.

Og so var lag á jólamanni at átaka sær strævna leiklutin enn eini jól. Og sjálvur sigur hann, nú hetta við pakkunum er somikið ómaksleyst, er als ikki óhugsandi, at hann heldur fram í starvinum eini 100 ella 200 ár afturat.


























